## Kaj Klein jammar á Skarv

Komandi leygarkvøld fer føroyski útisetatónleikarin og vestmeningurinin Kaj Klein at undirhalda á føroyska spælistaðnum Skarv í Keypmannahavn. Kaj Klein hevur nýliga givið út meistaraverkið ”Úr maskinrúminum” við heilu trimun fløgum, har m.a. góði yrkjarin Tóroddur Poulsen er við. Fløgan er tilognað farna bróður sín, Karl Anton Klein. Í tónleikaummæli 8. juli 2007 skrivar Sosialurin í yvirskriftini: ”Kaj hevur gjørt bestu føroysku útgávuna higartil í ár”. Kaj Klein syngur og spælir uppá auk./el. Guitar. Við sær hevur hann góða tónleikarin og danan Mikkel Røhrbæk á guitari, lapsteel og dobro (auk./el.)



## Ísrael letur palestinskar fangar leysar

Umleið 250 palestinskir fangar sluppu í morgun úr ísraelskum fongslum. Tað var Ehud Olmert, forsætisráðharri, sum gav boð um at lata fangarnar leysar, og hann hevur sostatt hildið lyftið, sum hann gav palestinska forsetanum, Mahmoud Abbas, herfyri. Ísraelskir fjølmiðlar siga, at teir fyrstu fangarnir sluppu úr Metziot-fongslinum har suðuri í landinum klokkan sjey í morgun. Sambært fongsulsmyndugleikunum skulu 256 fangar latast leysir. Teirra millum eru seks kvinnur.

# Norðoya Sparikassi metgott hálvársúrslit

Norðoya Sparikassi hevði fyrra hálvár eitt úrslit áðrenn skatt uppá 20 mió. kr. og er hetta besta hálvársúrslit, ið sparikassin nakrantíð hevur havt. Vøkstur hevur verið á øllum forrættningsøkjum og sást hetta aftur við at fíggjarjavnin er øktur við 25% hetta seinasta ári og er nú 2 millardir kr. Tað, at sprikassin hevur latið nýggjar deildir upp bæði í Saltangará og Tórshavn, hevur ført við sær munandi vøkstur bæði í útláni og innláni, og hevur útlánsvøksturin verið 34%, meðan innlánsvøksturin hevur verið 15%. Góða úrslitið hetta seinasta ári hevur gjørt, at eginpeningurin er vaksin við 13% og er nú 327 mió. kr. Starvsfólkatalið er vaksið nógv hetta seinasta ári, og er nú 55. Góða gongdin væntast at halda fram og rokna vit við, at úrslitið fyri alt árið fyri 2007 verður um 40 mió kr. áðrenn skatt.



# Fernisering verður í Ribarhús leygardagin

Tað er evnaríki fuglfirðingurin, Helgi Midjord, ið hevur málað við olju á lørift, og til 8. august verða 14 málningar hjá honum at verða sýndir fram í Ribarhúsi. Ferniseringin verður leygardagin kl 21. juli kl.16.00. Helgi fer sjálvur at spæla klassiskan gittara og syngja til ferniseringina. Hann hevur smíðað løg til yrkingar eftir Janusi Djurhuus og øðrum føroyskum skøldum. Umframt fara teir báðir, Niels Midjord og Petur Jacob Eliasen, at syngja týddar vísur hjá Evert Taube.

Gallarí Ribarhús er opið somu tíðir sum Piddasa handil, gerandis- & sunnudagar 15-17.30 og leygardag 11-13. Hyggið eisini inn á heimasíðuna www.ribarhus.com. við myndum og søgu bæði frá handlinum og gallarínum.



## »Iktys«

TÍÐINDASKRIV

“Iktys” nevnist handil í Tórshavn, sum selir brúkt klæðir. Orðið “Ichthys”, ið er griskt, merkir fiskur, og fiskurin var sum kunnugt symbolið hjá teimum fyrstu kristnu, eins og tað nú á døgum er symbol Neyðhjálp fólkakirkjunnar.

At nevna føroyskan klædnahandil “fiskurin”, varð hildið at vera heldur misvísandi í eini fiskivinnutjóð, tí útlendska “Iktys”.

Handilin, sum er á horninum Tróndargøta –Niels Winthersgøta, (gamla »Køkubúðin«), tekur fegin í móti brúktum, góðum og reinum klæðum, sum skulu kunna seljast í Føroyum. Klæðini verða síðani sorterað, og skitin klæði verða koyrd burtur. Onnur klæði, ið ikki metast at kunna seljast í Føroyum, verða send av landinum til aðrar hjálparfelagsskapir.

Í handlinum arbeiða ólønt fólk. Allar inntøkur ( - húsaleiga) fara óskerdar til Neyðhjálp fólkakirkjunnar í Danmark, ið fremur dygdargott hjálpararbeiði millum neyðstødd í øllum heimspørtum.

Handilin í Tórshavn er vorðin stuðlaður í fleiri førum, t.d. veittu “Pipar og Salt” kr. 100.000 til gávus, Hjalmar Jakobsens bókhandil gav kassaapparat, og “Hjálpirót” gav koyring.

Um tú, maður ella kvinna, sum hevur stundir/ ert upp á eftirløn ella annað og hevur hug at nýta ein part av tíni tíð í handlinum, kanst koma inn á gólvið og fáa eitt prát. Tú kanst eisini ringja til tlf. 319748/589421 (Oddvør). Vit gera skema til teir ymsu vikudagarnar, so tú veitst, nær tú skalt vera har og saman við hvørjum.

Arbeiðið er einfalt, samanhaldið er gott, og vit leggja tær lag á.

Handilin er opin gerandisdagar frá 13 – 17.30. Leygardag frá 11 - 14